**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 1 |
| Tíð: | 04-01-24 kl. 14.00 – 16.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Robert Vilhelmsen, næstformaður, Petur Rouch, skrivari, Julianna Klett, kassameistari, og Marin Rasmussen, limur.

**Fundarskrá:**

1. Samanumtøka 2023

<u>AD 1 Samanumtøka 2023</u>

Vit litu aftur á árið 2023 og kundu fegnast um, at Eldradagurin gjørdist eitt væleydnað tiltak. Høvuðsinnihaldið var ein roynd at fáa politisku skipanina at avtaka frádráttin í pensjónsveitingum, tá onnur inntøka fór uppum eitt ávíst mark. Vit halda okkum vita, at borgarstjórin av heilum huga tekur undir við uppskotinum. So nú fáa vit at síggja, um broyting fer at koma.

Tíverri hevur Eldraráðið í tveimum førum verið fyri missi av fólki, sum eru farin úr ráðnum. Og uppmøtingin hevur eisini verið darvað av sjúku.

Sagt verður frá Býráðnum, at tey har eru so fegin um at hava møguleikan fyri at spyrja Eldraráðið um ráð, tá talan er um viðurskifti, sum hava við tey eldru at gera. Hetta er nakað vit ikki kennast við, tí vit hava ONGANTÌÐ havt nakran fyrispurning um nakað sum helst. Tí ætla vit - nú vit fara inn í seinasta árið, áðrenn nýtt Eldrarráð verður valt - at seta okkum í samband við Heilsu- og eldradeildina í Tórshavnar býráð og biðja um fund um nærri samstarv.

Vit kundu hugsað okkum at havt nakrar framløgur í Tilhaldinum í inniverandi ári um viðurskifti, sum hava við tey eldru at gera. Nevnast kann arvarættur, tá makin fellur frá og tílíkt, og vóna vit, at Tilhaldið tekur undir við hesum.

Hetta seinasta er skrivað av mær, nú eg fari inn í áttunda og seinasta árið sum limur í Eldraráðnum:

Mítt hjartamál hevur verið bústaðarviðurskifti hjá teimum eldru. Vit tosa um íbúðir til lesandi, um Campus og um bústaðarneyðina sum eitt hitt mest álvarsama mál, hetta at fólk ikki fáa hóskandi bústað við hóskandi leigukostnaði. Eldraráðið hevur øll hesi árini, eg havi sitið har, havt frammi eitt ynski um, at kommunan aktivt fer inn og er við at gera íbúðir burtur av til tey eldru, men umberingarnar, at hetta ikki letur seg gera, hava verið mangar. Nú lógirnar eru broyttar, skuldu møguleikar verið at farið undir slíkar íbúðir, antin tær so eru leigu-, luta- ella eigaraíbúðir. Og eg tosi ikki um smærri eindir sum 15-20 íbúðir. Eg tosi um eldrabýlingar uppá 150-200 íbúðir við felags fasilitetum. Tað verður gjørt í londunum rundanum okkum, so hví ikki her. Havi ofta hugsað,

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

hvussu væl ein slíkur eldrabýlingur hevði riggað á Boðaneshamri ella har nærhendis. Men eins og við pensjónini, so eru vit pensjónistar tað gloymda ættarliðið. Havi hoyrt graml um, at ein ”pensjónistaflokkur” verður til komandi væl. Nógv fyri, at tað skal vera neyðugt.

Næsti fundur verður hósdagin 15. februar 2024 klokkan 13 í Tilhaldinum

Fundur lokin klokkan 16.00.

Tórshavn 04-01-2024

Petur Rouch,
skrivari